# Løgmaður lítlan hug á kringvarpsgjaldinum



Anfinn Kallsberg, løgmaður, er grundleggjandi ímóti ætlanini hjá landsstýrismanninum um at almennu loftmiðlarnir skulu fíggjast við einum kringvarpsgjaldi. – Talan er í veruleikanum at strika eitt brúkaragjald og í staðin áleggja øllum skattgjaldarum ein eykaskatt, sigur løgmaður.

**– Í mínum grundsjónarmiði eri eg ímóti at útskriva ein eykaskatt til at fíggja almennu loftmiðlarnar, og tí havi eg tikið fyrivarni móti uppskotinum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður um uppskotið hjá Annlis Bjarkhamar, at almennu loftmiðlarnir skulu fíggjast yvir skattin.**

LOFTMIÐLAR
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ætlaninar hjá landsstýrismanninum í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, um at áleggja øllum føroyingum ein kringvarpsskatt, fella ikki í góða jørð hjá Anfinni Kallsberg, løgmanni.

Verður uppskotið samtykt, so fer tað at merkja, at allir føroyingar yvir 18 ár, sum forvinna meira enn 30.000 krónur árliga, skulu gjalda eitt ávíst prosentgjald av síni inntøku í ein kringvarpsgrunn. Í uppskotinum er inngjaldsloftið sett til 1600 krónur um árið, men av tí at loftið verður rokkið longu tá inntøkan kemur upp á 68.000 krónur, verða tað tí tey flestu, sum koma at gjalda fult gjald.

Hóast Anfinn Kallsberg og Fólkaflokkurin ikki hava tikið endaliga støðu til uppskotið enn, so hevur uppskotið stóran prinsipiellan týdning fyri Fólkaflokkin. Anfinn Kallsberg vísir á, at talan í veruleikanum er um at strika eitt brúkaragjald, og í staðin innføra ein nýggjan skatt. Og tað er ímóti grundsjónarmiðunum hjá flokkinum.

– Eg má siga, at í prinsippinum eri eg í móti kringvarpsgjaldinum. Talan er jú í veruleikanum um, at vit »uppfinna« ein nýggjan skatt at leggja á fólkið, sigur Anfinn Kallsberg. Eftir hansara tykki er tað ein skeiv gongd at flyta ymiskar almennar skipanir og almennar tænastur og tilboð yvir í skattaskipanina og harvið skattarokningina hjá fólki.

Hóast tey allar flestu í dag vilja hava bæði útvarp og sjónvarp, so eigur tað framvegis at vera eitt val hjá tí einstaka, hvørt hann ella hon ynskir hesa tænastu, sigur løgmaður.

– Tað eigur at vera ein spurningur um at sleppa at velja. Við at fíggja almennu loftmiðlarnar við eykaskatti hevur tú tikið henda møguleika at velja frá fólki, og tað meti eg vera grundleggjandi skeivt, leggur Anfinn Kallsberg afturat.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur á landsstýrsfundi kunnað um kringvarpsgjaldið, og uppskotið er nú sent út til flokkarnar til viðgerðar. Annfinn Kallsberg sigur, at enn er uppskotið nýtt, og Fólkaflokkurin hevur tí ikki viðgjørt málið endaliga og hevur heldur ikki tikið nakra støðu til tað. Løgmaður sigur tó, at hann hevur gjørt landsstýrismannin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, varuga við grundleggjandi støðuna hjá sær og Fólkaflokkinum til málið.

– Eg havi boðað landsstýrismanninum í mentamálum frá, at eg ikki haldi uppskotið um eitt kringvarpsgjald, sum skal krevjast inn umvegis skattin, vera eitt gott hugskot, og at eg tí taki fyrivarni móti tí, sigur Anfinn Kallsberg. Her er jú talan um ein eykaskatt, sum avloysir eitt brúkaragjald, og tað eri eg grundleggjandi ímóti, leggur hann afturat.

Løgmaður heldur tað vera óheppið at alsamt fleiri gjøld verða løgd inn í skattaskipanina.

– Eftir mínum tykki er hetta ein skeiv gongd. Ein kann spyrja, hvar markið gongur fyri, hvussu nógv kann krevjast inn yvir vanligan skatt og eykaskatt, áðrenn tað er nóg mikið. Í staðin haldi eg, at tað eigur at vera eitt val hjá tí einstaka, um viðkomandi ynskir almennu tilboðini og tænasturnar, og ger hann tað, so eigur hann eisini at gjalda eitt brúkaragjald fyri hetta, sigur Anfinn Kallsberg.

## Bara skatt til ÚF og SvF

Uppskotið um kringvarpsskattin fer somuleiðis at merkja, at útvarps- og sjónvarpsgjaldið fara í søguna. Sum er fáa báðir stovnar líka nógv inn í lurtara- og hyggjaragjaldi, 16,7 milliónir krónur um árið í part, men sambært uppskotinum verður hetta nú broytt. Lagt verður nevniliga upp til, at Sjónvarpið skal hava 58 prosent av kringvarpsskattinum, meðan Útvarpið fær 42 prosent. Sostætt verður ikki lagt upp til, at aðrar rásir skulu hava burturav pengunum, sum verða kravdir inn í kringvarpsskatti.

Anfinn Kallsberg hevur ikki tikið støðu til, hvørt tað er rætt ella skeivt, at onnur fáa part av hesum pengum. Tí, sum hann sigur:

– Eg haldi tað vera grundleggjandi skeivt at krevja pengarnar inn við einum eykaskatti.

Ein av tingmonnunum hjá Fólkaflokkinum, Jógvan á Lakjuni, hevur fyrr ført fram, millum annað í Løgtinginum, at aðrar rásir eiga at fáa betri sømdir mótvegis almennu loftmiðlunum. Hann heldur tað vera upplagt at umrøða, hvørt onnur eiga at fáa part av kringvarpsskattinum, verður undirtøka fyri uppskotinum hjá landsstýrismanninum í mentamálum.

– Verður tað úrslitð, at kringvarpsskattur skal krevjast inn frá øllum føroyingum, so meti eg tað vera rætt at taka við í orðaskifti, um aðrar rásir skulu hava møguleika at fáa part av pengunum, sigur Jógvan á Lakjuni. Hann leggur afturat, at sjálvandi skulu nakrar treytir fylgja við, um onnur skulu fáa part av pengunum, sum koma inn gjøgnum kringvarpsskattin.

Jógvan á Lakjuni nevnir sum dømi, at nakrar »public service« skyldur kundu fylgt við pengum frá almenna kringvarpsskattinum.

– Í samband við hetta uppskotið, sum landsstýrismaðurin í mentamálum nú er komin við, haldi eg tað avgjørt vera rætt at taka spurningin við í orðaskfti, um partur av pengunum ikki kundi farið til aðrar rásir, sigur Jógvan á Lakjuni.

Tingmaðurin heldur eisini tað vera rætt at umrøða spurningin um alternativu inntøkurnar hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum, millum annað frá lýsinum, av nýggjum, skulu stovnarnir í framtíðini fáa ein kringvarpsskatt.

– Skulu almennu loftmiðlarnir fáa pengar umvegis skattin, so haldi eg tað vera rætt at knýta henda spurning saman við spurninginum um lýsingarinntøkurnar hjá stovnunum. Almennu loftmiðlarnir kappast jú við teir privatu um lýsingarinntøkurnar, vísir Jógvan á Lakjuni á.



# Ókeypis DR við donskum korti

**Fyri framvegis at síggja DR ókeypis kanst tú keypa eitt kort á einari danskari adressu, so er tað knapliga ókeypis at síggja DR**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Føroyskir kundar hjá Canal Digital skulu sum er gjalda 172 kr. um mánaðin ella 2.064 kr. árliga fyri at síggja DR.

Hetta nýtist kortini ikki at vera neyðugt. Tá vit ringdu og spurdu í Radiohandlinum í Havn um áhuga fyri at keypa DR millum føroyingar, fingu vit at vita, at nógvar føroyingar fáa tað framvegis fyri einki. Hetta gera teir við at keypa kortini í Danmark til eina danska adressu.

Skipanin virkar á tann hátt, at tað eru tey kortnummørini, ið eru keypt í Føroyum, sum ikki kunnu móttaka DR ókeypis frá Canal Digital. Er talan um eitt danskt kort, so er einki í vegin fyri at síggja ókeypis danskt sjónvarp á DR1 og DR2.

Av landafrøðiligum orsøkum liggur ógvuliga illa fyri hjá fólki í Føroyum at síggja aðrar fylgisveinar enn teir við Canal Digital. Tað er enntá so ómøguligt, at føroyingar fáa ein avsláttur, tí móttøkumøguleikararnir eru so vánaligir. Munurin er tó lutfalsliga lítil á prísunum. Um tú so eisini fært Danmarks Radio við, so broytir hetta óivað perspektivið nakað.

## Sami kostnaður

Kundatalið hjá Canal Digital í Føroyum er lutfalsliga rættiliga stórt. Eftir hvat skilst liggur millum 5.000 og 6.000, men hetta vil Canal Digital hvørki vátta ella avsanna.

Sløkt varð fyri Danmarks Radio fyrr í hesum mánaðinum fyri kundar, sum ikki tímdu at gjalda fyri at síggja almennu donsku rásirnar, í hesum førinum DR1 og DR2.

Hjá Canal Digital siga tey seg vera positivt yvirraska um áhugan fyri.

Peter From, marknaðarleiðari hjá Canal Digital í Danmørk, sigur, at teir hava fingið uppsagnir av haldum frá føroyskum, men hesi eru ógvuliga fá. Hinvegin eru teir vorðnir positivt yvirraskaðir um áhugan at keypa sær Danmarks Radio.

Peter From sigur, at teir royndu at fáa DR at minka prísin, men hetta eydnaðist ikki. Prísurin, ið føroyingar skulu gjalda, skal vera á leið tað sama sum danir gjalda í licens fyri at síggja DR.

— Politikkurin hjá Danmarks Radio er tann, at teir vilja hava fólk uttanfyri Danmark at gjalda licens fyri rásirnar eins og í Danmark. Vit royndu at forhandla okkum til ein bíligari prís, men hetta vildi leiðslan í DR ikki ganga við til, sigur Peter From.

Hann veit at siga, at Canal Digital og DR hava gjørt eina skrivliga avtalu, sum tryggjar, at Televarpið ella annar veitari ikki fær DR fyri minni enn Canal Digital.

— Tað merkir so, at fær Televarpið DR fyri ein bílígari kostnað enn vit, so kunnu vit krevja tað fyri júst sama kostnað. Hetta vil so merkja, at vit tá kunnu bjóða okkara kundum DR bílígari, sigur Peter From.

Persónliga heldur hann, at tað er undarligt, at DR velur at gera soleiðis við tann føroyska marknaðin, tá hugsað verður um, at Danmarks Radio sendingar fyri ein stóran part eru at síggja í almenna føroyska sjónvarpinum.

Hjá Radiohandlinum í Havn hava tey lagt til merkis, at fólk helst vilja bíða eitt sindur við at taka avgerð um, hvørt tey skulu fáa sær DR, Canal Digital ella okkurt annað, nú Televarpið eftir ætlan byrjar í næstum.

## Samráðast við DR

Televarpið samráðist í løtuni við DR um eina avtalu at senda teirra rásir.

Tróndur Djurhuus hevur áður sagt, at teir hava gjørt av, at DR verður við í teirra útboði, men spurningurin um kostnaðin er ikki greiddur.

Tað leyp hvøkk á Televarpið, tá tað fréttist um avtaluna millum Canal Digital og Danmarks Radio.

Tróndur Djurhuus heldur hesa avtaluna vera sera dýra, men kann tó enn einki siga um, hvørja avtalu Televarpið megnar at fáa við Danmarks Radio.




*Tað nýtist ikki at vera tøkniliga óheppið ikki at síggja DR.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Pornografiskt tilfar um fylgisvein:

# Egin ábyrgd

**Við verandi skipaðum mugu fólk sjálvi syrgja fyri, at porno ikki verður víst í húsarhaldinu, um tey ikki ynskja tað**

SJÒNVARP
*Heri á Rógvi*

Í komandi mánað byrjar Televarpið at senda fylgisveinarásir í Føroyum. Sum nevnt fyrr í vikuni sendir ein av rásunum, Canal+, pornografiskar filmar. Sum er síggja túsundavís av føroyingum hesar filmar, um teir ynskja tað. Tað er eisini ein góður møguleiki fyri, at enn fleiri fáa atgongd til hetta slagið av undirhaldi við Televarpinum.

Sum kundi hjá Televarpinum skalt tú vera 18 ár. Tað eru sostatt vaksin fólk, sum keypa, og líkt er eisini til, at tað verður teirra egna ábyrgd, hvat tey og teirra børn ella onnur síggja.

Varafútin greiddi í týsdags Sosialinum frá, at tað er sera ivasamt, um tað er løgfrøðilig orsøk til at forbjóða hesum sum støðan er nú. Orsøkin er tann, at tilfarið verður sent uttan út heimi, og tað er eitt føroyskt felag, sum løgfrøðiliga sendir tilfarið. Í síðsta enda verður hetta ein dóms- og tulkingarspurningur.

Í øllum førum liggur ábyrgdin sum nú hjá tí einstaka kundanum.

Peter From frá Canal Digital, sum bjóðar Canal+ og harvið pornografiskt tilfar til føroyingar, sigur, at fólk sum er kunnu lata vera við at hyggja at pornofilmunum við at forða fyri hesum við teirra móttakarum, sum hava eina sokallaða foreldraverju innbygda.

Sum er eru eingir aðrir møguleikar at forða fólki at hyggja at tí heldur nakna undirhaldinum. Filmarnir verða sendar á trimum ymsum rásum, og hetta ger tað eisini ógvuliga trupult at sløkkja og tendra fyri teimum.

## Norra

Í Føroyum fáa kundar hjá Canal Digital donsk kort, og hesi hava onga sperru móti pornografiskum tilfari.

Tað hava kortini í Norra. Í Norra eru strangar lógir móti porno, og hjá norsku kundunm hjá Canal Digital ber ikki at síggja pornografiskar filmar í heilum líki.

Peter From sigur annars, at teir hálvavegna høvdu roknað við kapping, og teir ætla so at halda fram á føroyska marknaðinum, uttan at gera tær stóru broytingarnar. Canal Digital koyrir í løtuni eina herferð í Føroyum, og greitt er, at teir eiga ein stóran kundaskara í Føroyum.



*Nógv bendir á, at er og verður upp til fólk sjálvi, um tey ynskja at síggja porno ella ikki. Møguleikan hava í øllum førum nógv*